# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*Týsdagin 6. okt. bleiv Natalia stórasystur til lítlu Naomi. Naomi er født á Ríkissjúkrahúsinum. Hon var 47 cm long og vigaði 2830 gr. Foreldrini eru Jóhanna Maria og Heðin Wenningstedt, Hvalvík.*



*Tann 17. oktober fekk Ólavur ein lítlan beiggja, sum eitur Ragnar. Hann varð føddur á Hvidovre Hospitali, var 52 cm langur og vigaði 3180 gr. Foreldrini eru Jóna og Frans Fossá, búsitandi København*

29. september fingu Heidi Mortensen og Andru Jóanesarson Joensen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2860 gr.

9. oktober fingu Inga og Jens Pauli Nielsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2970 gr.

15. oktober fingu Kristina og Patrick de Neergaard, Vágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3860 gr.

16. oktober fingu Pernille Mittún og Mohsen Darvishi, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3300 gr.

19. oktober fingu Elsa og Kent Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4100 gr.

21. oktober fingu Aline O. Anghel og Sorin O. Anghel, Hvalvík, ein son. Hann var 52,5 cm langur og vigaði 3525 gr.

21. oktober fingu Svanhild Madsen og Magni Dam, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3640 gr.

22. oktober fingu Kirstin Hansen og Sámal Tórstein Olsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

# Mirjam við nýggjari fløgu



*Systkini Mirjam og Sofus*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Týsdagin 27. oktobur kemur út nýggj fløga, kallað „Hvíld". Tað er Mirjam Carlsen, sum á egnum forlag gevur fløguna út. Fløgan er partvís innspæld í Nashville og Tampa í USA og í Føroyum.

Flestu sangirnir eru nýumsettir sangir, sum ongantíð hava verið útgivnir fyrr.

Mirjam hevur altíð sungið. Í sunnudagsskúlanum fekk hon gott í beinini við sangi saman við pápanum Finni og systkjunum annars. Bæði sum ung, og seinni sum búgvin kvinna, hevur Mirjam luttikið á nógvum ymiskum plátu- og fløguútgávum, og mundi hon nokk gerast kendast fyri luttøkuna saman við Myrnu og Sofusi. Saman við døtrunum Vanju, Lailu og pápanum Finni Hansen, luttók Mirjam eisini á nøkrum útgávum.

Nú er so stundin komin til eina nýggja solofløgu, har Mirjam hevur valt sangir, sum henni hevur dámað sera væl at sungið seinastu árini. Í samstarvi við Jóhan við Neyst úr Klaksvík, sum hevur umsett flestu sangirnar, hevur tað eydnast at samla hesar sangir saman og geva teir út.

Tað er country-snidlingurin Jákup Zachariassen, sum hevur endaliga samskipað tónleikin, við tað at ein partur er innspældur í USA. Væl kendir føroyskir tónleikarar hava givið teirra íkast eisini. Tað eru døturnar Vanja, Laila og Barbara, saman við Noé Chaparro og Jón Svein Heinesen, ið hava sungið kórrøddir. Eyðun Johannesen hevur ljóðblandað og mastrað fløguna.




Bróðurin Sofus Hansen luttekur eisini á tveimum sangum, og er tað við gleði, at hetta samstarv aftur er komið í lag. Umframt Sofus luttekur eisini Betesdakórið í Klaksvík á einum sangi. Fløgan verður at fáa bæði í vanligum tónleika- og fløguhandlum, eins og servicestøðum og øðrum handlum og kioskum kring alt landið.

